




## *Harry Benja-minsen* (53)

**Hvussu leingi hevur tú verið brandmaður í Skálafjarðar Sløkkiliði?**
- Minnist ikki heilt, men eg man hava verið við í eini 20 ár.

**Hvussu nógvir mans eru tit, sum umboða Nes kommunu?**
- Vit eru sjey her úr kommununi og átta úr økinum innanfyri, sum eru saman um Brandstøðina í Runavík og annars eru partur av Skálafjarðar Sløkkiliði.

**Hevur tú verið úti til nógvar uppgávur gjøgnum árini?**
- Ja, eg havi verið til nógvar ymiskar uppgávur, bæði í samband við eld, illveður – og ferðsluvanlukkur, tá vit hava skorið bilar við okkara klippiútgerð.

**Er nøkur serlig uppgáva, sum tú hevur verið partur av?**
- Ja, tá russiski trolarin Olshana sakk við Flesjarnar, vóru vit nakrir, sum vórðu settir niður á skipið úr tyrlu. Hetta var eitt upplivilsi. Vit vóru á skipinum, til stutt áðrenn tað sakk.

**Tit eru tilsamans 44 sløkkiliðsfólk úr Skálafjarðar Sløkkiliði, men eingin kvinna?**
- Nei, eingin kvinna hevur nakrantíð verið partur av manningini.

**Eru kvinnur ikki egnaðar til slíkar uppgávur?**
- Bæði ja og nei. Tað er so torført at meta um henda spurning. At vera sløkkiliðsfólk kann vera strævið fysiskt – og viðhvørt eisini psykiskt. Men ivaleyst eru eisini kvinnur eisini egnaðar til hesar uppgávur, um tær hava eginleikarnar, sum skulu til fyri at vera sløkkiliðsfólk.

*vilmund@sosialurin.fo*

# »Vælfarið«




Skattalógin komandi, ið skal tryggja okkum vælferðarsamfelagið

## Í MORGIN

*6/9 °C*




Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind av vestri. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 6 og 9 stig.

## MIKUDAGIN

*5/8 °C*




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, seinnapartin nakað minni vindur. Sólglottar, men okkurt ælið og hitin millum 5 og 8 stig.

## HÓSDAGIN

*4/7 °C*




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, seinnapartin nakað minni vindur av norði. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin upp í stívt andøvsgul av norði og kavaælingur, Leygardagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 971 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer eisini í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstøkið vestan fyri Føroyar fer spakuliga norðureftir og gevur vaksandi vestanvind á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 79 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

30. okt Seinna kvarter
3. nov Mánin næstur jørðini
6. nov Tendring

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. nov | 01:55 | 14:18 | 00:55 | 13:18 | 01:10 | 13:33 | 03:55 | 16:18 | 04:55 | 17:18 | 00:10 | 12:33 | 11:33 | 23:56 | 02:10 | 14:33 | 03:10 | 15:33 | 01:40 | 14:03 | 02:55 | 15:18 |
| 2. nov | 02:41 | 15:04 | 01:41 | 14:04 | 01:56 | 14:19 | 04:41 | 17:04 | 05:41 | 18:04 | 00:56 | 13:19 | - | 12:19 | 02:56 | 15:19 | 03:56 | 16:19 | 02:26 | 14:49 | 03:41 | 16:04 |
| 3. nov | 03:29 | 15:51 | 02:29 | 14:51 | 02:44 | 15:06 | 05:29 | 17:51 | 06:29 | 18:51 | 01:44 | 14:06 | 00:44 | 13:06 | 03:44 | 16:06 | 04:44 | 17:06 | 03:14 | 15:36 | 04:29 | 16:51 |
| 4. nov | 04:17 | 16:41 | 03:17 | 15:41 | 03:32 | 15:56 | 06:17 | 18:41 | 07:17 | 19:41 | 02:32 | 14:56 | 01:32 | 13:56 | 04:32 | 16:56 | 05:32 | 17:56 | 04:02 | 16:26 | 05:17 | 17:41 |
| 5. nov | 05:08 | 17:34 | 04:08 | 16:34 | 04:23 | 16:49 | 07:08 | 19:34 | 08:08 | 20:34 | 03:23 | 15:49 | 02:23 | 14:49 | 05:23 | 17:49 | 06:23 | 18:49 | 04:53 | 17:19 | 06:08 | 18:34 |